

*Kristian hevði verið sjúkur av epilepsi, men eftir viðgerð hjá Ulriku Steuerwald, lækna á Landssjúkrahúsinum gjørdist hann frískur. Ikki langa tíð eftir hetta doyði Kristian, tá hann datt niður í eina brunnin á myndini*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

um man var blivin eitt sindur bríndur. Man krevur at koma út millum fólk beinanvegin, og ikki seta seg inn at kúra.

Eins og frammanundan vóru nógv fólk, ið vístu samkenslu í stóru sorgini. Serliga minnist Sólvit ein teirra, sum ringdi til sín – Levi Joensen úr Klaksvík, og sum tá hevði sítt andaliga virksemi í Hirtshals. Teir vóru javngamlir, høvdu siglt saman sum skipari og stýrimaður, og vóru tí góðir vinir.

– Tá Kristian var deyður, ringdi hann til mín úr Danmark. Hann segði m.a. við meg, at hann visti so lítið at siga við meg í eini slíkari støðu. »Men eitt skal eg siga tær, Sólvit«, segði Levi, og siteraði so úr Bíbliuni, har Jesus sigur: »Tað, sum Eg geri, skilir tú ikki nú; men tú fert at skilja tað seinnih (Jóhs. evang. 13,7, blðm.).

– Hóast eingin okkara skilti, hví hetta skuldi henda okkum, so gjørdu hesi orðini mær gott, staðfestir Sólvit.

Ein sunnudag eftir jarðarferðina var Sólvit í kirkju, og tá var prestur og prædikaði. Hann veit ikki, um hetta var prædikuteksturin til henda sunnudagin ella um prestur sjálvur hevði valt tekstin. Prestur segði í øllum førum í prædikuni eini onnur orð, sum Sólvit enn minnist, nevniliga, at tá aksini eru búgvin, tá verða tey skorin, annaðhvørt tey eru ung ella eldri.

– Eg skilti tá henda tekstin betri. Tað ljóðaði sum um prestur hevði valt hesi orðini júst til mín!

Eins og fyrru ferðina visti Sólvit, hvat best var at gera eftir slíkan miss. Hann vildi koma víðari, hóast óvanligu og ógvusligu hendingarnar sum honum høvdu verið fyri. Hann fór tí rættiliga skjótt á staðið, har hann so mangan hevði verið áður – úti í Støð á Sandi.

– Har koma nógvir av mínum javnlíkum, og vit hava altíð tosað saman um alt. Her tosa vit ikki bert um sorg og sakn, men um tað sum vit eru vanir við. Eg haldi, at hetta var tað besta hjá mær, fyri at vinna meg aftur, slær Sólvit fast.

> Tað var tungt hjá tykkum, ítróttarfelagar, skúlafelagar og aðrir vinir, at Ólavur so knappliga bleiv tikin burtur. Hjálpi tykkum Gud at føra bæði gaman og álvara víðari. Og tú, stakkals ungdómur sum kom fyri ta tungu lagnu at koyra á Ólav. Tú fært somu heilsan sum hini

## SÓLVIT Í MINNINGARORÐUM UM **KRISTIAN:**

– Kristian var blíður við øll, og við tað at eingi børn vóru í grannalagnum, so áttu øll hann, og hann kallaði øll fyri ommur og abbar. Hann hevði fast pláss niðan fyri húsini hjá Borghild ommuni, har tað var ógvuliga áhugavert at síggja, hvussu væl hann fylgdi við øllum. Hann kendi teir flestu bilarnar, og tað var ikki tað menniskja ið kom forbí hann, ið ikki steðgaði at tosa við henda fitta og skilagóða drongin.

– Hann var ramligur, ansaði væl eftir hvat ið bleiv sagt og royndi at taka uppaftur, t.d. ein dagin eg kom norður eftir vegnum, omman, mamman og lítli Kristian stákaðust í garðinum hjá teimum. Tá ið hann sá meg, lenaði hann seg niður á garðin og helt fyri: »Ja, so tavagud er hettar abbin!«.

– Kristian dámdi væl at geva ommuni og mammuni blomstur, og allur vøkstur var vakur í hansara eygum: sýrulokkar vóru vakrir, og eplastelkarnir í garðinum skuldu ikki blakast burtur, tí tað vóru vøkur blomstur.

– Men brúka vit vit og skil, so vita vit, hvussu gott hesin lítli eingilin hevur tað í sínum rætta heimi.